





# Sangskrivararnir sleppa at syngja aftur




*– Loungin var full til hvørt umfar í fjør, og eg vænti tað sama í ár. Føroyingar elska at hoyra nýggjan føroyskan tónleik, og við hesum tiltaki eru vit við til menna føroyskan tónleik, sigur Michael Jensen, ein av fyriskiparunum av Singer/Songwriter kappingini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tónleikakappingin Singer/ Songwriter á Hotel Hafnia Lounge fer aftur av bakkastokki leygarkvøldið. Danskir tónleikaskótar ætla at lurta eftir finaluni í kappingini**

SINGER/ SONGWRITER
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið fáa evnaríkir sangskrivarar og sangarar aftur møguleika fyri at framføra sín tónleik alment. Hotel Hafnia Lounge verður aftur í ár karmur um tónleikakappingina, Singer/Songwriter, sum fløguaktuelli, Kristleif Zachariassen, vann í fjør.

Michael Jensen er ein av fyriskiparunum av Singer/ Songwriter-kappingini, og hann sigur, at kappingin varð væl móttikin bæði av áhoyrarum og tónleikarum í fjør, og tí gjørdu fyrireikararnir av at skipa fyri kappingini aftur í ár.

– Loungin var full til hvørt umfar í fjør, og eg vænti tað sama í ár. Føroyingar elska at hoyra nýggjan føroyskan tónleik, og við hesum tiltaki eru vit við til menna føroyskan tónleik, sigur Michael Jensen

Fimm luttakarar hava higartil boðað frá luttøku í ár, og tað er nakað minni enn í fjør.

### Tveir finalistar

Kappingin í ár verður skipað í tveimum undanumførum og síðan einum finaluumfari. Tónleikarar spæla í alt trý løg í part- tvey skulu vera egin, men eitt lag stendur teimum frítt at syngja.

Luttakararnir verða síðan vigaðir av trimum dómarum, sum gera av hvør sleppur víðari í finaluumfarið. Kappingin er skipað so, at bert ein luttakari sleppur víðari úr hvørjum umfari.

Michael Jensen greiðir frá, at tónleikarskótar úr Danmark hava ætlanir um at koma til Føroya at lurta eftir finaluni í kappingini.

### Vælumtókt sjangra

Uttanfyri Føroyar er Singer/Songerwriter tónleikasjangran ógvuliga væl umtókt í løtuni. Tónleikasjangran er sprottin úrUSA og til Evropa. Millum kendu nøvnini innan Singer/Songwriter sjangruna kunnu nevnast John Majer, David Gray og okkara egni Teitur Lassen

**FAKTA**

**Luttakararnir í 1. umfarí Singer/Songwriter-kappingini:**
Atli Joensen
Rókur J. Jákupsson
Jóan Petur av Stongunum












## *Felags avgerðir*
## *– Felags ábyrgd*

**Almennur valfundur verður á Føroya læraraskúla hóskvøldið 4. november kl. 19.00**

Undir heitinum "Felags avgerðir - Felags ábyrgd" verður skipað fyri politiskum valfundi á Føroya Læraraskúla. Tær, sum fáa høvi at taka orðið hetta kvøldið, eru tey kvinnuligu valevnini, sum bjóða seg fram at stýra Tórshavnar kommunu.

Tað eru løgtingskvinnurnar og umboð fyri flokkarnar á tingi, sum ikki hava kvinnuliga umboðan, sum skipa fyri.
Fundurin byrjar stundisliga kl. 19.00 og endar umleið kl. 21.00.

Gjørt skal verða vart við at fundurin er almennur, og at øll eru hjartaliga vælkomin.

Orðstýrari er Bjørt Samuelsen.

*Vegna fyrireikararnar*
**Annita á Fríðriksmørk**

